## Jupiter liðugur við markelkvotuna

Jupiter kom til Føroya í gjár, og nú skal ymiskt gerast við skipið. Tað hevur gingið væl hjá Juputer, síðani gøtumenn keyptu skipið í august. Jupiter fór fyrst á sild og landaði seinastu ferð tann 7. novembur. At kalla øll sildin, sum teir fingu, fór til matna. Teir byrjaðu at fiska makrel um hálvan oktober, og kvotan var liðug fyri nøkrum døgum síðan, tá teir landaðu 760 tons av makreli fyri góðar 6,2 mió. krónur. Í hesum tíðarskeiðnum, hava teir eisini gjørt tveir sildatúrar. Jupiter kom á Skálafjørðin seinnapartin í gjár, og nú skal ymiskt smávegis gerast við skipið, skrivar reiðaríið á heimasíðuni.



# Umhvørvið er ábyrgdin hjá okkum øllum

**– Tað, sum eg haldi er mest áhugavert, nú eg skjótt skal byrja í starvinum sum SEV-stjóri, er framtíðin – hvussu eg sum stjóri saman við leiðslu og starvsfólkum annars kann bera felagið longur fram á leið. Tað, sum liggur fyri framman, er meira áhugavert enn tað, sum liggur aftanfyri, sigur Hákun Djurhuus, sum Sosialurin hevur skift orð við**

PRÁT
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Seinasta fríggjadag kunngjørdi Elfelagið SEV, at stýrið fyri felagið hevur gjørt av at seta Hákun Djurhuus, fyrrverandi stjóra í P/F Føroya Shell, í stjórastarvið hjá felagnum. Virkandi stjóri í løtuni er Poul Arni Jacobsen, sum annars hevur verið næstformaður í stýrinum. Nú hann situr sum virkandi stjóri, er hann ikki limur í stýrinum, men hevur varamannin sitandi, til hann seinni tekur álitisstarvið aftur.

### Saman við Poul Arna

Sosialurin hevur skift orð við nýggja stjóran, Hákun Djurhuus, sum alment tekur við stjórastarvinum 1. januar 2008, men sum longu 1. desember byrjar í føstum starvi hjá felagnum.

– Vit hava avtalað, at eg skal arbeiða saman við virkandi stjóranum, til eg alment taki við sum stjóri. Poul Arni hevur í nógv ár sitið í stýrinum fyri SEV og hevur eisini áður verið stýrisformaður. Tí hevur hann stóran kunnleika til felagið, og eg vænti, at hann saman við øðrum góðum fólkum innan felagið verður mær hollur í ráðum.

Stjórin í SEV gjøgnum mong ár, Klæmint Weihe, er nú í øðrum starvi, men hann segði, tá ið hann gjørdi av at fara úr stjórastarvinum, at hann vildi vera tøkur í ráðum, um brúk var fyri tí.

– Enn er alt so nýtt, og tí dugi eg ikki at siga, hvør tørvurin verður í so máta, men tað er náttúrligt, at Klæmint Weihe, sum hevur myndað felagið øll hesi ár, hevur allan kunnleikan um SEV og virksemið hjá felagnum, sigur Hákun.

### Framtíðin avgerandi

Vit spurdu eisini, hvørja mynd hann hevði av Klæminti sum stjóra í SEV, meðan hann sjálvur sat í stjórastarvinum hjá Shell.

– Vit seldu nógva olju til SEV, og vit høvdu eitt gott samstarv, eisini eg og Klæmint. Eg havi bara gott at bera honum, og eg haldi, at málini, sum hann hevur verið við til at seta út í kortið fyri felagið, eru skilagóð.

Hákun heldur kortini, at tað, sum er mest áhugavert í hansara verð, nú hann skal byrja hjá SEV, er framtíðin – hvussu hann sum stjóri saman við leiðsluni annars og tí fólki, sum er í fyritøkuni, kann bera felagið longur fram á leið.

– Tað, sum nú liggur fyri framman, er meira áhugavert enn tað, sum liggur aftanfyri, heldur hann.

### Minni útlát

Nýggi stjórin vísir á, at ein av uppgávunum hjá felagnum verður at fáa ein uppaftur størri part av orkuni, sum felagið framleiðir, úr varandi orkukeldum.

– Í dag koma 45% av orkuni úr varandi orkukeldum, vatni og vindi. Hetta er nakað, vit kunnu vera errin av, og hetta er eitt gott ískoyti til tað at “uppføra” seg pent sum heimsborgari, um vit so kunnu siga.

Hann vísir á, at málið hjá felagnum er at náa upp á tey 55% úr varandi orkukeldum í 2015, og hann heldur, at vit eiga at seta okkum málið enn hægri.

– Sum føroyingar eiga vit at vera errin av, at ein so stórur partur av okkara elframleiðslu stavar frá varandi orkukeldum, og úteftir eiga vit at fortelja hetta og kunna gleðast um tað. Vit eiga eisini at kunna fortelja



*- Vit eiga at vísa ábyrgd og gera viðurskiftini burðardygg allan vegin ígjøgnum. Vit eiga at læra okkum at virða náttúruna nógv meira, og her haldi eg, at tað tíbetur gongur rætta vegin hjá okkum, sigur Hákun Djurhuus*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*